## Dystir um vikuskiftið

**Hondbóltur**

Coca-Cola kappingin

Kvinnur

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 02.02 | 15.00 | VÍF | - | Stjørnan |

Menn

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 02.02 | 17.00 | StÍF | - | Neistin |

1. deild kvinnur

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 03.02 | 14.30 | Kyndil | - | Sóljan |

1. deild menn

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 03.02 | 16.00 | Kyndil | - | Tjaldur |

**Flogbóltur**

Meistaradeild kvinnur

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 03.02 | 15.00 | ÍF | - | Mjølnir |

Meistaradeild menn

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 03.02 | 15.00 | Mjølnir | - | SÍ |
| 03.02 | 15.00 | Fleyr | - | Fram |

## Flogbóltsstøður

**Meistaradeild, kvinnur**

| | | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | TB | 12 | 11 | - | 1 | 34 | 9 | 25 | 15 |
| 2 | Mjølnir | 12 | 8 | - | 4 | 28 | 18 | 10 | 11 |
| 3 | Dráttur | 12 | 5 | - | 7 | 23 | 25 | -2 | 6 |
| 4 | ÍF | 12 | 4 | - | 8 | 20 | 29 | -9 | 5 |
| 5 | Fleyr | 12 | 2 | - | 10 | 9 | 33 | -24 | 3 |

**Meistaradeild, menn**

| | | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Fleyr | 12 | 8 | - | 4 | 29 | 21 | 8 | 11 |
| 2 | SÍ | 12 | 8 | - | 4 | 30 | 17 | 13 | 10 |
| 3 | Fram | 12 | 8 | - | 4 | 29 | 20 | 9 | 10 |
| 4 | ÍF | 12 | 3 | - | 9 | 16 | 32 | -16 | 6 |
| 5 | Mjølnir | 12 | 3 | - | 9 | 16 | 30 | -14 | 3 |

## Hondbóltsstøður

**1. Deild kvinnur**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 3 | 3 | - | 0 | - | 0 | 443 | 265 | 178 | 18 |
| 2 | Stjørnan | 3 | 3 | - | 0 | - | 0 | 401 | 313 | 88 | 15 |
| 3 | VB | 4 | 3 | - | 1 | - | 0 | 377 | 380 | -3 | 13 |
| 4 | Neistin | 4 | 1 | - | 1 | - | 2 | 344 | 312 | 32 | 11 |
| 5 | Kyndil | 3 | 0 | - | 0 | - | 3 | 338 | 396 | -58 | 3 |
| 6 | StÍF | 3 | 1 | - | 0 | - | 2 | 269 | 351 | -82 | 3 |
| 7 | Sóljan | 4 | 0 | - | 0 | - | 4 | 285 | 440 | -155 | 2 |

**1. Deild menn**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 4 | 4 | - | 0 | - | 0 | 470 | 386 | 84 | 19 |
| 2 | Neistin | 4 | 3 | - | 0 | - | 1 | 494 | 415 | 79 | 16 |
| 3 | StÍF | 3 | 2 | - | 0 | - | 1 | 415 | 402 | 13 | 10 |
| 4 | Tjaldur | 4 | 2 | - | 0 | - | 2 | 401 | 448 | -47 | 8 |
| 5 | H71 | 4 | 0 | - | 1 | - | 3 | 438 | 466 | -28 | 7 |
| 6 | Kyndil | 3 | 1 | - | 1 | - | 1 | 342 | 395 | -53 | 5 |
| 7 | KÍF | 4 | 0 | - | 0 | - | 4 | 415 | 463 | -48 | 4 |

# Oddadystur og grannauppgerð

**Bert tríggir dystir eru í bestu flogbóltsdeildunum hetta vikuskiftið, og mest áhugavert sær tað út í Havn, har oddaliðið í mansdeildini Fleyr tekur ímóti grannunum úr Fram. Triði FM-biðilin SÍ spælir móti Mjølni í Klaksvík**

FLOGBÓLTUR

*Emil Lisberg Jacobsen*




*Síðstu ferð Fleyr og Fram møttust í Gundadalshøllini, var tað eitt sindur óvæntað Fleyr, sum fór við sigrinum, og síðani hevur eldra havnarfelagið vunnið seg upp á fremsta plássið í deildini*

Tað eru bert tríggir dystir í meistaradeildunum á skránni hetta vikuskiftið, sum tí verður rættiliga friðarligt í mun til so ofta fyrr. Og tó.

Ein av hesum trimum dystunum er nevniliga »slagið um Havnina« millum Fleyr og Fram, og støðan í kappingini er soleiðis, at dysturin eisini fær stóran týdning fyri slagið um allar Føroyar.

Fleyr er fremst, eitt stig frammanfyri Fram og SÍ, sum vitjar í Klaksvík í morgin.

### Grannastríð

Síðstu ferð Fleyr og Fram møttust í Gundadalshøllini, var tað eitt sindur óvæntað Fleyr, sum fór við sigrinum. Tað úrslitið hevði við sær, at Fleyr aftur blandaði seg upp í oddastríðið, og nú eru teir so fremst. Men tað er somikið javnt, at um Fram vinnur í morgin, samstundis sum SÍ vinnur móti Mjølni, dettur Fleyr heilt niður á triðja pláss. Verður tað hinvegin Fleyr, sum vinnur í morgin, hevur Fram trý stig upp til oddasessin, og tað kann vísa seg at gerast ov nógv í síðsta enda. So tað er ikki pláss fyri mistøkum í morgin.

Tað er tað heldur ikki hjá sørvingum, sum neyvan vilja seta stig til móti botnliðnum Mjølni. Á heimavølli eru klaksvíkingar ikki altíð so mjúkir at strúka, men stigatalvan lýgur ongantíð, og hon sigur, at Mjølnir er aftast. Samstundis er SÍ ein av FM-favorittunum, so tað líkist einum útisigri í KÍ-høllini í morgin.

### Síðsta royndin hjá Mjølni

Hjá kvinnunum skal Mjølnir royna at leggja seinasta trýstið á TB. Dysturin millum hesi bæði liðini síðsta vikuskifti var ein lykladystur, sum TB vann, men mjølnirkvinnurnar kunnu enn klára tað. Gamaní skulu tær hava góða hjálp frá øðrum liðum, men tær hava so slettis ikki ráð til at tapa meir sjálvar.

Mótstøðuliðið í morgin er ÍF, sum vann móti Drátti síðsta sunnudag, og sum nú hevur vent eyguni frá botninum og móti bronsuni. Í so máta kann ein sigur móti Mjølni í morgin koma sera væl við, men í útgangsstøðinum sær mjølnirliðið ov sterkt út. Spurningurin er so bara, hvussu demoraliseraðar tær eru eftir tapið í Trongisvági fyri eini viku síðani.

## Máltindarnir:

**Kvinnur:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Asta Petrauskine | Sóljan | 135 | (20) |
| Simona Dziugyte | Stjørnan | 133 | (38) |
| Lotte Sørensen | Kyndil | 107 | (47) |
| Gabriella Fekete | VB | 104 | (26) |
| Ioana Rápa | VÍF | 97 | (23) |
| Regina Radó | VB | 86 | (21) |
| Joan M. Joensen | Stjørnan | 78 | (2) |
| Ileana Manulescu | StÍF | 76 | (12) |
| Katrin á Neystabø | Neistin | 76 | (35) |
| Annika Ljósstein | Kyndil | 75 | (13) |
| Anna K. Samson | Stjørnan | 66 | (1) |
| Andrijana Milodanovic | Stjørnan | 66 | (9) |
| Sóley Mikkelsen | VÍF | 64 | (12) |
| Birita Wardum | Neistin | 62 | (10) |
| Nicoleta Radu | VÍF | 58 | (1) |

**Menn:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Bjarni Wardum | H71 | 110 | (27) |
| Jacob Jónsson | Neistin | 106 | (15) |
| Heini Joensen | Neistin | 104 | (32) |
| Costin Dumitrescu | StÍF | 95 | (28) |
| Høgni Klein | Kyndil | 93 | (7) |
| Dragisa Stojovic | Tjaldur | 91 | |
| Ingi Olsen | VÍF | 91 | (11) |
| Finnur Hansson | H71 | 89 | (21) |
| Halgir Dahl Olesen | H71 | 87 | (11) |
| Sámal Joensen | VÍF | 86 | (13) |
| Durica Tomic | KÍF | 83 | (22) |
| Iljan Topic | KÍF | 82 | |
| Sverri Justinussen | Tjaldur | 78 | (9) |
| Artur Johansen | StÍF | 73 | (5) |
| Áki Olsen | VÍF | 71 | (10) |


# Vikuskifti

Nr. 23 • leygardagur • 2. februar 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo


**Altíð verið samkyndur**

- Líka síðani eg gekk í barnagarði havi eg vitað, at eg eri samkyndur, sigur 30 ára gamli Ulrik Skytte, sum býr í Havn

**Lesið á síðu 3**





*- Eg havi tað grundreglu, at maturin sum eg geri, skal vera bíligur, skjótur og léttur at gera, sigur Maud Matras, kokkur á Hotel Hafnia*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Maud Matras:

# Hvítleykskokkurin á Hafnia

Tá Maud Matras var gestakokkur í okkara køki í sjónvarpinum, munnu flest øll hava undrað seg yvir tey 80 hvítleyksfetini, sum fóru í matin. Sjálv sigur Maud, at fólk eru vorðin kløkk av hesum, tí tey halda, at hvítleykur er sterkur. – Men hvítleykur er bara sterkur, tá hann er ráur. Hann er ikki sterkur, tá hann er viðgjørdur, sigur hvítleykskokkurin, Maud Matras á Hotel Hafnia

MATGERÐ

*Ingrid Bjarnastein*

Áhugin hjá Maud fyri mati byrjaði í 1982 í Póllandi, har hon var á einum garði. Har hevði ein kókikona á garðinum ein hestavogn, sum hon brúkti at koyra stórar grýtur við um summarið til jarðarferðir, fermingar og annað gott.

– Hetta helt eg vera ógvuliga spennandi, sigur Maud.

– Hon var sjálvforsýnandi við kjøti, eplum og øllum, og eg helt hetta vera ógvuliga undrunarvert. Og soleiðis byrjaði eg so smátt at hugsa um at gerast kokkur.

Maud byrjaði á kokkaskúlanum EFG í eitt ár, og fór síðani í læru í Brønnum eftir tað.

### Døma hvítleyk

Sjálv sigur Maud, at hon etur ikki meira hvítleyk enn onnur. Tó so, á Hotel Hafnia verður nógvur hvítleykur brúktur um dagarnar, og Maud heldur, at fólk gera av frammanundan, hvat tey halda um hvítleyk, og hon heldur ikki, at tey 80 fetini av hvítleyki, hon brúkti í sjónvarpinum, høvdu so nógv at siga. Hon sigur seg ofta hava verið við til at gera mat til fólk, ið siga seg als ikki dáma hvítleyk, men hóast tað, so hevur hvítleykur verið í matinum, og tey hava als ikki varnast hetta.

– Talið av hvítleyki hevur onki at siga, tað er smakkurin sum telur, greiðir Maud frá.

– Eg havi arbeitt á støðum har vit hava fingið boð um at brúka so lítið av hvítleyki sum møguligt, soleiðis at hvítleyksbrúkið varð avmarkað. Her á Hafnia er tað øvugt. Her verða vit næstan eggjað til at brúka hvítleyk.

Einasta kravið á Hotel Hafnia viðvíkjandi mati er, at buffetin verður gjørd. Til restina fáa kokkarnir fríar hendur, og heldur Maud, at hetta er ógvuliga spennandi, og hevur hetta við sær nýggjar avbjóðingar hvønn dag. Tað gongur ikki ein dagur, har nýggir og spennandi rættir verða tilgjørdir, og er ein av høvuðsgrundunum, at íblástrarkeldan er í sjálvum køkinum. Tí í køkinum á Hotel Hafnia eru ikki minni enn seks ymsar tjóðir umboðaðar.

– Rættirnir, sum koma undan kavi, koma heilt frá uppvaskara til kokk, og ofta byggja vit víðari uppá aðrar uppskriftir, sigur hvítleykskokkurin.

Guðmundur Guðmundsson, kendur frá sjónvarpinum, leggur afturat, at ein kokkur er ongantíð útlærdur, tí avbjóðingarnar eru óteljandi.

### Bíligt, skjótt og lætt

Sjálvari dámar Maud best at gera suðurlendskan mat, og finnur hon meginpartin av sínum íblástri í turkiska køkinum.

– Turkiski køkurin hevur nógvar smáar rættir, sum smakka av nógvum, og dámar mær hetta ógvuliga væl, sigur Maud.

– Men um eg veruliga skal hugna mær heima við hús, so geri eg ræst kjøt, tí tað dámar mær best.

Maud heldur, at føroyingar hava tann fyrimunin, at tað føroyska kjøtið verður kryddað av Várharra.

– Tað einasta vit skulu gera er at tilseta vatn og eitt lítið sindur av salti. Sjóluftin ger, at tann føroyski mátin at goyma mat uppá, ger føroyska kjøtið heilt serligt, og er føroyskt kjøt nakað, sum vit skulu halda fyri okkum sjálvi og ikki flyta út, sigur ein flennandi Maud Matras.

Sambært Maud, so hava fólk ein óvana at hanga seg ov nógv í uppskriftirnar, teimum verða givnar.

– Tað bilar onki, um tú ikki eigur basilikum – ger bara rættin uttan basilikum. Mær hevur verið fortalt, at tú skalt lesa eina uppskrift tríggjar ferðir ígjøgnum, og síðani gera hana, soleiðis tú minnist hana, tí tú minnist bara tað tær dámar.

– Sjónvarpið, vikubløð, kókibøkur og annað hjálpa fólki at koma í gongd. Eg havi tað grundreglu, at maturin sum eg geri, skal vera bíligur, skjótur og léttur at gera, sigur Maud at enda.

Men a la carte matskráin hjá Hotel Hafnia kann í øllum førum reypa av, at allir rættirnir, ið eru at fáa, eru heimagjørdir rættir, tað vil siga teir hava allir sæð sín fyrsta tallerk í køkinum á Hotel Hafnia.